**Sørvágs kommuna**
**FR-380 Sørvágur · Føroyar**
Tlf. 32004 - 33122
Telefax 009 298 32952

Sørvágur 31.12.1994






**Árið** 1994 lækkar eins og setandi sól, og um skamma stund eru vit aftur komin til eitt ársskifti; -- eins og teir longdu og ljósaru dagarnir vit ganga ímóti, vóna vit eisini at koma inn í eitt vónríkt 1995.

**Bygdaráðið** hevur havt 19 fundir í farna árinum og viðgjørt umleið áttati mál: byggiloyvi - matr. sundurbýti - skattamál - sáttmálar o.a.

Sum áður frágreitt samtykti undanfarna bygdaráð at seta á stovn barnagarð, og 10. novembur 1992 samtykti hetta bygdaráðið at fullføra barnagarðsætlaninar, men sum kunnugt gekst ógvuliga striltið at fáa fíggingina í lagi, og sum eisini áður frásagt, so eydnaðist okkum at fáa eina "alternativa" fígging, sum vit fingu endaliga góðkenning til í septembur 1993, og mánaðarskifti oktobur/novembur 93 var byrjað uppá innandura umbyggingina, sum var liðug fyrst í februar 94, og stovnurin lat upp 14. februar 1994.

Fíggjarætlanin til umbyggingina av sýslumanshúsunum var uppá kr. 360.000. Nú byggiroknskapurin er endaliga uppgjørdur, er samlaði byggikostnaðurin av umbyggingini kr. 350.676,94.

Barnagarðurin "Sýslan" er sjálveigandi stovnur, ið verður stjórnaður av eini 5-mannanevnd, sum er eitt sindur broytt, síðani barnagarðurin byrjaði, við tað at í reglugerðini fyri stovnin stendur, at tveir nevndarlimir skulu veljast millum foreldur at bornum í barnagarðinum, og á fundi í "Sýsluni" 10. februar 1994 var samtykt at velja Astu Jacobsen og Herfríð Falkvard sum foreldraumboð í stýrið; út gingu Jákup á Stongum og Poul A. Jacobsen.

Samlaða lánibyrðan hjá "Sýsluni" er kr. 1.290.677, og viðvíkjandi rentum og avdrøgum av hesum góðkenda láni rindar Almannastovan 60% og Sørvágs Kommuna 40%.

Í uppskotinum til barnagarð í Sørvági var arbeitt við, at har eisini skuldi verða pláss fyri brekaðum børnum, vitandi um at stuðulstiltakið "Daljansstova" í Sandavági skuldi niðurleggjast, og 21. mars 1994 samtykti Felagskommunan í Vágum at rinda kommunala kostnaðin av upp til 5 brekaðum børnum á stovninum.

Síðani barnagarðurin byrjaði, hevur eisini verið arbeitt við at fáa umlætting fyri brekaði á stovninum í vikuskiftunum. Hetta tiltak byrjaði 1. juli 94, og er annaðhvørt vikuskifti frá fríggjakvøld kl 18.00 til sunnukvøld kl 18.00. Fýra starvsfólk arbeiða uppá skift og verða lønt av Almannastovuni.

Viðvíkjandi arbeiði er 1994 eitt vónríkt ár í mun til 1993, tá alt lá steindeytt.

Skamt framman undan jólum í 93 fekk kommunan frænir av, at Føroya Landsstýri arbeiddi við at deila alingina í Føroyum í skiftisøkir, og í hesi ætlan var Sørvágur lagdur út sum skiftisøki hjá alarum úr aðrari oyggj. Hesum mótmæltu vit við tí úrsliti, at vit fingu eitt alibrúk á fjørðin í 94, og gongur sum ætlað, so skuldi tað givið nøkur arbeiðspláss í bygdini í 95 í samband við tøku av fiski.

Viðvíkjandi innkeypi og tilvirkan av fiski eru tvey partafeløg sett á stovn í 94, og eru tey bæði farin undir virksemi sítt í seinnu helvt av 94. Tað er vorðið lív í aftur úti á bakka. Nógv fólk til arbeiðis og fitt av peningi er flutt í lønum, sum so aftur dryppar í kommunukassan. Vónandi fer hetta virksemi at halda á og mennast í 95, so vit fáa meira støðugt arbeiði, men tað krevst, at allir partar standa og arbeiða saman fyri at hesar fortreytir kunnu lúkast.

Av játtanini "Ung í arbeiði" fyri 94 frá Føroya Landsstýri fingu vit kr. 216.000, og bygdaráðið játtaði eitt ískoyti á kr. 60.000. Arbeiðini, hesi ungu hava gjørt, eru: uppstoyping av SÍ húsinum - Kirkjugøtan niðan á skúlan er gjørd liðug - Mýran er niðurtikin - Garðurin í "Sýsluni" er gjørdur - Handilin hjá Løðu-Niclas er niðurtikin(her skal skoytast uppí, at økið verður gjørt liðugt á vári 95). Haraftrat hava tey havt aðrar smærri uppgávur, sum koma undir vanligan rakstur. Arbeiðstíðin hevur verið frá viku 22 til og við viku 31.Tað vóru 31 ung í aldrinum 16-26 ár, sum vóru við í tiltakinum "Ung í arbeiði 1994".

Viðvíkjandi endurreisn av p/f Vestís: á fundi á kommunuskrivstovuni 21.02.94 millum nevndina í p/f Westfish og umboð fyri Sørvágs Kommunu heitti nevndin á kommununa um at skipa so fyri, at kommunan/Sørvágs Havn ognaði sær ísvirkið og fekk tað at koyra aftur, tá hetta var ein fortreyt fyri fiskaframleiðslu. Hesum máli hava vit so arbeitt við, og endaliga loysnin var, at vit keyptu partapeningin hjá fyrrverandi flakavirkinum (kr.283.000) frá trotabúnum fyri kr. 20.000. Síðani er avtala gjørd við kreditorarnar, um at skuldin uppá kr. 1.083.000 var útloyst við einum gjaldi áljóðandi kr. 163.000.

Ísvirkið er sett í stand, og nú tað er byrjað at lata ís, stendur tað í kr. 375.000. Ognarviðurskiftini eru nú soleiðis, at Sørvágs kommuna/Sørvágs havn eiga kr. 283.000 av partapeninginum, og 33 aðrir partaeigarar eiga tilsamans kr. 57.000. Í Nevndini hjá p/f Vestís eru: Eivin Jacobsen,nevndarformaður - Erik Davidsen - Petur Kruse - Poul A. Jacobsen og Pauli Jensen.

Komandi oljuvinna verður "møguliga" ein hjálp at endurreisa okkara búskap, og til tess at Vágoyggin skal sleppa upp í part í hesum oljumeldri, hava vit gjørt eitt miðvíst arbeiði innan hetta økið við tí fyri eyga at marknaðarføra okkum. Saman við hinum kommununum í oynni hava vit valt eina oljunevnd , sum hevur til endamáls at "kanna" eina komandi oljuvinnu. Í henni sita: Dánjal Thomsen og Jákup Joensen úr Sandavági - Páll Joensen úr Miðvági - Jákup Persson og Eivin Jacobsen úr Sørvági.

Fíggjarætlan fyri 1995. Ásetan av skattaprosenti er avgerandi fyri inntøkuna hjá kommununi! Sambært lóg frá Føroya Løgtingi var skattaprosentið hjá føroysku kommununum læst fast millum 16 og 23%, og harav skulu allar kommunur seta 1% í ein kommunalan kreppulánsgrunn, sum verður settur á stovn fyri at hjálpa teimum kommununum, sum eru illa fyri fíggjarliga, men her má leggjast aftrat, at í skrivandi løtu er framvegis ongin reglugerð gjørd fyri henda grunn???.

Endaliga fíggjarætlanin var einmælt samtykt á bygdaráðsfundi 30.11.94.

| | 1995 | 1994 |
|---|---|---|
| Skattskyldug inntøka | 73 mill | 68 mill |
| Skattaprosent | 22% +1% | 22% + 1% |
| Barnafrádráttur | 2500 | 2500 |
| Kirkjuskattur | 0.05% | 0.1% |

Skattainntøkan í 95 er mett til u.l. 13,5 mill grundað á skattskylduga inntøku uml. 73 mill sambart fyribilsskattalistanum frá Toll- og Skattstovu Føroya. Rentir og avdráttir samanlagt í 1995 eru mett til u.l. 4,7 mill út frá verandi lániavtalum.

Fíggjarætlanin vísir eitt hall á u.l. 0,6 mill, tá er íroknað afturgjalding av ov nógv útgoldnum skatti í 94 á kr 0,4 mill (íalt ljóðaði rokningin uppá u.l. 1,3 mill) og gjald til kreppulánsgrunnin á u.l. kr 0,6 mill. Sostatt svarar hallið í 95 u.l til gjaldið í kreppulánsgrunnin fyri sama ár.

Út frá hesum tølum sæst, at enn verður tungt hjá okkum øllum at fáa tað at mala fíggjarliga, men vit vóna, at teir glottar, sum hómaðust í 94 fara støðugt at mennast og gera tað meira liviligt fyri okkum.

Tað búgva í dag 913 fólk í Sørvági - 493 mannfólk og 420 konufólk. Hyggja vit í hvørjum aldursbólkum hesi fólk eru, sæst at 8 børn eru fødd í 94.

| 1-6 ár | 7-16 ár | 17-20 ár | 21-30 ár | 31-40 ár | 41-50 ár |
|---|---|---|---|---|---|
| 96 | 132 | 44 | 104 | 123 | 128 |

| 51-60 ár | 61-70 ár | 71-80 ár | 81-90 ár | 91-99 ár |
|---|---|---|---|---|
| 100 | 81 | 80 | 15 | 2 |

Munurin á aldursbólkinum 16 ár til 30 ár: 100 mannfólk og 61 konufólk.

Viðvíkjandi húsunum sær støðan soleiðis út: íalt eru uml. 340 hús. Av teimum standa uml. 50 tóm ella partvís tóm. Í uml. 75 húsum er bert eitt fólk og uml. 70 húsum tvey fólk. Í uml. 140 húsum eru trý fólk ella fleiri.

Hetta var so ein roynd at kunna bygdarfólkið eitt sindur um støðuna, vit eru í, og er tað onkur, íð saknar onkra vitan av almennum áhuga ber til at venda sær til skrivstovuna.

At enda verður øllum bygdarfólkinum ynskt eitt gott og vælsignað nýggjár.

SØRVÁGS KOMMUNA
Petur Kruse
Petur Kruse, form.




Sørvágs Kommuna
Útreiðslubýti í 1994
Skúli og mentan (13,2%)
Felagsgjøld (2,7%)
Maskinur og amboð (3,2%)
Rentir og avdráttir (42,9%)
Almanna og heilsumál (15,1%)
Landsvegagjald (1,6%)
Renovatión (7,0%)
Fyrisiting o.a. (5,3%)
Vegir og veitingar. (9,0%)


Sørvágs kommuna
Nettoskuld og skattainntøka 1989-94
40.000
20.000
0
1.000 Kr.
29.000
35500
36600
37800
36700
33500
14.000
13.700
13.000
12.700
13.600
13.500
1989
1990
1991
1992
1993
1994
Ár
Nettoskuld
Skattainntøka